Sosialurin

Nr. 30 - 12. februar 2009

## Mesta arbeiðsloysið í 14 ár

Tey nýggjastu hagtølini hjá íslendska arbeiðsmarknaðinum vísa, at um mánaðarskiftið vóru 10.456 íslendingar skrásettir sum arbeiðsleys. Sostatt var íslendska arbeiðsloysið tá 6,6 prosent. Hagtølini vísa eisini, at 2.554 fólk mistu arbeiðið í januar, og sostatt vaks arbeiðsloysið heili 32 prosent eftir einum mánaði. Til sammetingar vóru 1.545 íslendingar arbeiðsleysir fyri einum ári síðani, og tá var arbeiðsloysið eitt prosent. Morgunblaðið skrivar, at arbeiðsloysið í Íslandi nú er tað størsta síðani januar í 1995.



## Veiðitrýstið skal skerjast

Tað nýggja álitið, sum skal brúkast sum grundarlag fyri komandi fiskivinnupolitikkinum í Grønlandi, mælir til fleiri munandi broytingar í verandi vinnu. Millum annað verður skotið upp at áseta mark fyri mest loyvdu veiði fyri hvørt fiskaslag sær, at báta- og skipaeigarar fáa kvotur fyri fleiri ár ísenn, og at kvoturnar skulu vera umsetiligar. Nevndin, sum hevur skrivað álitið, sigur í niðurstøðuni, at ein avgerandi fyritreyt fyri bygnaðarbroytingunum er, at veiðitrýstið verður skert.

# Fiskar elska frost



*Tað var Karin Margretha Larsen, sum í gjár í síni verju av síni Ph.D ritgerð, vísti á, at frost er gott fyri fiskarnar*




*Sambært úrslitunum í kanning, sum fólk á Fiskirannsóknarstovuni hava gjørt, so er tað ein stórur fyrimunur fyri gróðurin í sjónum, um tað er kalt í luftini. Tí hetta ger sjógvin á landgrunninum kaldan, og tað merkir minni útskifting í sjónum*

*Kelda: Heimsatlas*

**Skulu vit vóna góðan fiskiskap, stórar árgangir av fiski, nógvan pening og so framvegis, so gera vit gott at ynskja okkum kaldar vetrar. Hetta er tað, Karin Margretha Larsen og onnur hava funnið fram til í eini kanning av havstreymum og gróðri**

HAVFRØÐI

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Kaldari sjógvurin á landgrunninum er, í mun til havið uttanfyri, minni er útskiftingin í sjónum og betri verður gróðurin. Hetta merkir somuleiðis, at fiskurin trívist betri, tí hann hevur meiri at eta, og etur tí ikki sítt egna yngul. Hetta merkir so, at meiri og feitari fiskur er, og tí verður meira fiskað. Nakað soleiðis er tankagongdin aftanfyri úrslitini, sum fólk á Fiskirannsóknarstovuni hava funnið fram til.

Karin Margretha Larsen, havfrøðingur, er ein av teimum, ið hevur arbeitt við hesi tesu, og í gjár vardi hon sína Ph.D í Bergen í Noregi. Ritgerðin er um havstreymar og útskifting av sjónum kring Føroyar.

### Kalt er gott

Um veturin verður grundin løgd fyri gróðurin árið eftir. Er tað kalt um veturin, kølnar sjógvurin inni við land meira enn sjógvurin longri úti. Hesin hitamururin merkir síðani, at minni útskifting er í havinum, tá botnurin skal leggjast. Hetta hevur við sær, at gróðurin ikki verður skræddur burtur av streymunum og tí verður betri gróður, tá várið byrjar.

Til hesar kanningar er ein rúgva av hitamátingum, sum eru gjørdar í havinum kring Føroyar. Bæði á landgrunninum og í havinum longri úti.

### Grundkanningar

Hesar kanningar eru sokallaðar grundkanningar, sum verða nýttar til eina størri kanning. Ætlanin við hesi stóru kanningini er at finna fram til, hvussu havlívið kring Føroyar er, og soleiðis kann Fiskirannsóknarstovan vera vísari í sínum tilráðingum til fiskiskap.

### Altjóða áhugi

Av tí, at landøkið kring Føroyar er so lítið, so eru lutfalsligu broytingarnar í havinum rímiliga stórar. Hetta hevur við sær, at mann kann leggja merki til broytingar, sum ikki eru líka lættar at leggja til merkis aðrastaðni. Tí hava kanningarnar hjá Fiskirannsóknarstovuni stóran altjóða áhuga.